## Seinasti arbeiðsdagur hjá Jóannes

**Sandur:** Í hesi vikuni verður seinasti arbeiðsdagurin hjá Jóannes á Klettum, Sandi sum leiðari hjá Landsverk í Sandoynni. Jóannes byrjaði í 1973 og nú hann gevst fer hann at taka sær meiri av løttum. - Jóannes hevur verið álitismaður um ein háls, skrivar Sandoyarportalurin. Um vikuskiftið kom rættiliga nógvur kavi niður og nógvastaðni varð grivið, eisini á Sandoynni.



## Hækka lodnukvotuna

**Ísland:** Íslendski fiskimálaráðharrin hevur gjørt av at hækka kvotuna av lodnu í íslendskum sjógvi við 20.000 tonsum. Av hesum fáa íslendingar sjálvir 18.000 tons, skrivar 123.fo. Samlaða kvotan til íslendsk skip er sostatt 108.000 tons. Henda øking í kvotu av lodnu er gjørd eftir tilmæli frá íslendsku havstovuni, sum hevur gjørt stovnsmetingar. Í hesum sambandi hava fleiri skip verið úti og kannað, hvar og hvussu nógv lodna er at síggja.

# í Húsavík



*Borgarstjórin í Húsavík, Jákup Martin Sørensen kann fegnast um, at tað verður ikki leingi, til klárt er til aðru útstykkingina í nýggjari tíð í Húsavík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

*Norðalaga í Húsavík standa fleiri nýggj hús, og nú er ikki óhugsandi at enn fleiri verða bygd í næstum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*